# Stór mál

ZAKARIAS WANG



Tá hetta verður skrivað, sigur álmanakkin at dagurin er 17. september 2008.

Liðin eru 62 ár síðani teir hugvekandi dagarnar í 1946, tá ið føroyingar høvdu samtykt at geva løgtinginum og donsku stórnini tað ráð at frema loysing Føroya og Danmarkar millum. Júst á hesum degi skrivaði formaður Javnaðarfloksins P. M. Dam eina grein, har hann segði seg fúsan at fylga ráðum føroyinganna.

Meir og meir bendir á, at tað var eitt gott ráð, føroyingar góvu løgtingi og donsku stjórnini. Tann skipan, vit fingu í staðin fyri, gevur ikki okkum sum her búgva nóg góðar møguleikar fyri at bjóða tí uppvaksandi ættarliðinum so góð kor, at tey velja at seta búgv her hjá foreldrum og skyldfólki.

Hetta er størsta mál, sum stendur fyri framman hjá teimum, sum skulu stýra í hesum landi.

Eitt annað stórt mál er at fullfíggja okkara samferðslukervi við at binda oyggjarnar sunnanfyri saman við teimum norðaru oyggunum. Her er tað Suðurtunlarnir sum skulu til. Hetta er eitt stórt tak bæði tekniskt og fíggarligt. Tekniskt ber tað til. Fíggarliga orka vit eisini hetta. Halda vit uppat at hava bummgjald í verandi undirsjóvartunlum, fer tá at bera til at flyta arbeiðsmegi og fæfeingi um alt landið, og tað fer at vaksa um møguleikarnar hjá virkjum at standa seg í kappingini.

Hitt triðja stóra málið er at einskilja ta almennu jørðina í Føroyum. Í løtuni er henda jørð ein kleppur fyri tað almenna, men so títt og knapt hon verður einskild, kemur lív í. Við trygd í henni fer at bera til hjá eigarunum at reisa kapital. Teir kunnu sjálvir ráða fyri, á hvønn hátt hesin kapitalur verður nýttur. Teir sum duga hetta best, fara at seta í gongd virkir, sum kunnu geva landi okkara nýtt lív og uppvaksandi ættarliði okkara nýggja vón.

Nú er upp á tal at teir flokkar, sum sótu á tingi í 1946, skulu gera samgongu. Kunnu teir gera nakað fyri at loysa hesi trý vandamálini?

Ja, hví ikki tað?

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin samtyktu tá at leita til Føroya fólk fyri at fáa ráð. Teir hava tí moralska skyldu til at fylgja tí ráði, fólkið gav. Hóast Fólkaflokkurin ikki greiddi atkvøðu fyri endaligu orðingini av lógini um fólkaatkvøðu, vildi hann eisini fáa fólksins ráð, og er tí eisini moralskt forpliktaður at fylgja hesum ráðum. Tað kemur ikki at standa á hjá hesum flokkum at fáa fulla undirtøku í tinginum fyri at seta hetta í verk.

Sama er um ta útbygging av samferðslukervi okkara, sum ber við sær at sjálvt Suðuroyggin kemur at vera minni enn tima í bili frá høvuðsstaðnum. Fyrsti politikari, sum førdi hetta alment fram, er ein av fremstu monnunum í hesi nýggju samgongu, og nógvir av teimum, sum halda hesum landsstýri uppi, eru mangan noyddir at sigla til hesar núverandi útoyggjar.

Men hvat við einskiljing av jørðini? Kann henda samgongan gera nakað við hetta málið, sum í meir enn 150 ár hevur ligið sum ein marra yvir øllum føroyskum politikki?

Her man lítið vera at ivast í hvat ið Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum viðvíkur. Teir eru borgaraligir flokkar og skilja hvønn týdning tað hevur at fleiri sleppa at vera við í kappingini við tað at tey fáa fíggjarligar møguleikar fyri at fáa sett virki á stovn. Men hvat við Javnaðarflokkinum?

Tað land, sum hevur klárað seg allarbest undir javnaðarleiðslu, er Singapore. Orsøkin er tann, at javnaðarmenninir har siga, at tað er umráðandi, at fólk eiga nakað av landinum, um tað so bert er ein eigaraíbúð. Fyri at halda landinum uppi er neyðugt at tey ungu vilja verja hús og heim, fólk og fæ. Tað lættir um í so máta, at tey eisini verja sítt egna. Hesin hugburður ger, at tey eisini royna at gera gagnligt arbeiði fyri fosturlandið á annan hátt, t.d. við at fáa virkir. Tað er hetta sum hevur gjørt, at meðan Singapore fyri 150 árum síðani hevði sama fólkatal sum Føroyar, so búgva nú fleiri fólk har enn í Danmørk.

Javnaðarflokkurin vil eisini, at tað skal gangast Føroyum væl, og tí eru góð útlit fyri, at hann fer at nýta fyrimyndina hjá floksfeløgum sínum í hesum fjara landi.

Um so er, at nýggja landsstýrið nýtir tað høvið, sum tað hevur fyri at geva landi okkara hesar nýggju møguleikar, so kunnu vit ikki annað enn fegnast um at flokkarnir finna saman.

# Tíðin farin frá brúkaragjaldið fyri dagstovnapláss

JARVIN FEILBERG HANSEN

Formaður í Føroya Pedagogfelag



Kommunurnar áttu at avtikið brúkaragjaldið dagstovnunum. Hendan skipan, ið helst hevur sín uppruna í einum samfelag, har tú kundi velja, um tú vildi hava barnið á einum stovni ella ikki, er ótíðarhóskandi og grunda á, at tað bar til at velja.

Tað munnu verða fáar føroyska familjur, ið kunnu velja ein dagstovn frá, og spurningurin er eisini, um tað er skilagott at gera tað.

**Tað eru tveir høvuðs tørvir talan er um:**

**1.** Búskaparligi tørvurin hjá samfelagnum og familjuni

**2.** Tørvurin hjá barninum og samfelagnum.

Búskapartørvurin hjá samfelagnum er ein spurningur um at fáa brúkt tað menniskjasliga tilfeingi sum er til taks í samfelagnum, soleiðis at virðir og tænastur verða skaptar. Familjan hevur búskaparliga tørv á inntøkum, at kunna lívbjarga sær, og tískil mugu tey arbeiða.

Stutt sagt: Samfelagið hevur ikki ráð til at kvinnurnar halda seg frá arbeiðsmarknaðinum og kostnaðarstøðið í samfelagnum ger, at familjur mugu hava tvær inntøkur fyri at kunna hava líkinda livikor. Hetta hevur sjálvsagt eisini økkurt við trivnaðinum hjá fólki at gera.

Eisini hevur barnið ein tørv góðum umstøðum at mennast í, serliga í hesum "globala" samfelagnum. Hetta kann knýtast at einum samfelagsligum tørvi, har samfelagið hevur tørv á so vælvirkandi samfelagsborgarum, sum gjørligt. Tá slepst ikki undan at vit hava tørv á góðum dagstovnum har ið "fokus" er sett á menningina hjá hvørjum einstaka barni.

Tí eiga kommunurnar at avtaka brúkaragjaldið á stovnunum og viðurkenna, at eitt dagstovna pláss er ein rættur, ið øll børn hava, óansæð fíggjarlig viðurskiftið hjá foreldrunum. Øll børn eiga rættin at fáa eina javnbjóðis byrjan á tilveruna. Hetta er veruligur familjupolitikkur – og er tað nakað ikki nakað vit sakna her í Føroyum?

# Eingin áhugi fyri samanlegging við Klaksvík

**Eftir at valhølið í Hvannasundi lat aftur fyri løtu síðani, eru atkvøðurnar taldar upp og uppgjørt er, hvørt bygdarfólkið ynskir eina samanlegging við Klaksvíkar kommunu ella ikki. Fólksins hugsan var púrasta greið – eitt nei**

FÓLKAATKVØÐA

*Snorri Brend*

*snorri@sosialurin.fo*

Hvannasund: 208 ímóti av 278. Greiðari kann tað ikki sigast!

Tað verður eingin samanlegging millum Hvannasunds kommunu og Klaksvíkar kommunu á hesum sinni.

Hetta vísti úrslitið av fólkaatkvøðuni í Hvannasundi í gjár, har borgararnir skuldu taka støðu til samanleggingina ella ikki.

Borgarstjórin í Hvannasunds kommunu, Júst Poulsen sigur í stuttari viðmerking við Sosialin, at úrslitið er púra greitt.

- Fólkið hevur talað. Meir er ikki at siga um tað!, er stutta viðmerking hansara.

**75 - 25**

Súsanna Christiansen, sum er limur í valnevndini í kommununi upplýsir, at íalt vóru 278 av teimum 321 veljarunum á vali.

Og úrslitið er púra greitt: 208 atkvøður vóru ímóti samanlegging og einans 68 fyri, og tvær blankar. Hetta svarar aftur til, at sløk 75 prosent eru ímóti at leggja saman við Klaksvík, meðan góð 24 prosent er sinnað fyri hesum.

Út frá hesum kann má tí sigast, at arbeiðið hjá meirilutanum í Hvannasunds kommunu, saman við býráðnum í Klaksvík, ikki hevur havt stórvegis ávirkan á bygdarfólkið.

Hóast bygdafólkið nú hevur talað, fer bygdaráðið kortini at hava eyka fund í kvøld, har hetta úrslitið skal viðgerast.

Pól Fuglø, næstformaður í bygdaráðnum og ein av forsprákarunum fyri eini samanlegging sigur, at hann sjálvandi góðtekur úrslitið av fólkaatkvøðuni.

- Sohvørt sum dagurin nærkaðist skilti eg, at fólkið ikki var sinnað fyri eini samanlegging. Eg hevði faktiskt væntað, at tað fór at verða eitt nei, men eg hevði ikki væntað, at munurin varð so stórur, sigur hann.



*Fólkið í Hvannasundi segði greitt nei til samanlegging við Klaksvík*

Sjálvur heldur hann at forarbeiðið hevur verið gott, men at fólkið altso ikki hevði somu hugsan sum meirilutin í bygdaráðnum.

- Tað haldi eg vera stórt spell, sigur hann.